# Mitsubishi Lancer – nú sum sportligur sedan

**Nýggjasti Mitsubishi Lancer, sum einans hevur fingist sum stationcar, fæst nú eisini í eini sportligari sedan útgávu við 2.0 litur motori. Bilurin er gjørdur við rallybilinum Lancer EVO IX sum fyrimynd**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens K. Vang*




*Mitsubishi lancer Sedan 2.0 við 135 hk og beinleiðis bensininnspræning*

**FAKTA**

**Mitsubishi Lancer Sedan 2.0**

| | |
|---|---|
| **Motorurin** | 2,0 litur 4 syl. 16V og 135 hk |
| **0-100 km/t** | 10,0 sek |
| **Bensinnýtsla** | 11,6 km/l |
| **Dekkstødd** | 195/50-16 |
| Stødd og vekt: | |
| **Longd** | 448,5 cm |
| **Breidd** | 169,5 cm |
| **Hædd** | 148,0 cm |
| **Eginvekt** | 1250 kg |
| **Viðførisrúm** | 430 litrar |
| **Prísur** | frá kr. 205.000,- |
| **Søluumboð** | Ivan Johansen Bilar<br>Hoyvíksvegur 63<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 313666<br>www.ivan.fo |

Tað koma alt fleiri modell frá Mitsubishi á evropeiska marknaðin. Seinasta nýggja er Lanser Sedan, sum er ein sportlig útgáva við nógvari eykaútgerð og 3 ára garanti uttan kilometuravmarking.

Mitsubishi kundu fyri tann skuld nevnt bilin Sport Sedan, tí hann er gjørdur við framkomna rallybilinum Lancer EVO IX sum fyrimynd. Tað sæst eisini aftur í koyrieginleikunum og útgerðini annars. Spoilarin aftan setur eisini sín sportliga dám á bilin. Motorurin er ein 2,0 litur við 135 hk og beinleiðis bensininnspræning.




*Spoilarin aftan setur sín sportliga dám á bilin*



*Lancer Sedan innan við t.d. MOMO-leðurratti, crom-pedalum og leður girknøtti*

Lancer Sedan 2.0 er væl útgjørdur við t.d. ABS bremsum við EBD og skivubremsum á øllum fýra hjólunum, 16" alufelgum, heilautomatiskum klimaanleggi, el-síðurútum framman og aftan, fjarstýrdum sentrallási, airbag framman, í síðunum og gardinairbag, 3-punkts trygdarbeltum við øll sitiplássini, el-síðuspegl við hita, elektroniska startsperru og MOMO-leðurratt, crom-pedalir og leðurgirknøtt, RDS-radio við fløguspælara, hita í setrunum. Førarasetrið kann stillast í hædd, so lætt er at finna sær eina góða koyristøðu.

Lancer Sedan er ein elegantur og rúmligur sedan við góðum, tryggum og sportligum koyrieginleikum. Talan er um ein bil sum avgjørt er kappingarførur í prísi og dygd.

Umframt hesa 2.0 útgávuna fæst Lancer Sedan eisini í eini útgávu við 1,6 litur motori sum kostar frá 188,000,-. Bilurin kann síggjast og roynast á bilasøluni Ivan Johansen Bilar við Hoyvíksvegin.

---

Intrum Føroyar:

# Guli bilurin sæst aftur í landslagnum

**Fólk í Havn hava lagt til merkis ein sterkt gulan Peugeot 307 við "Fair Pay" skeltum og løgnu áskriftini á síðuni: "Ikki gera ikki nakað". Tað er fyritøkan Intrum Føroyar, sum eigur bilin. Vit hava spurt stjóran, Jákup Bech Jensen, hvat alt hetta er fyri nakað**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Jákup Bech Jensen, sjóri í innkrevjingarfyritøkuni Intrum Føroyar, sigur, at tað kann koma fyri hjá okkum øllum, at vit gloyma at gjalda eina rokning ella ikki hava pening at gjalda við, tá ið hon fellur til gjaldingar. Orsøkirnar kunnu vera so ymiskar. Men avleiðingin verður, at peningur restar í hjá tí, sum hevur sent rokningina. Hetta er peningur, sum viðkomandi hevur væntað sær at fáa, og tí vendir viðkomandi sær til okkara fyri at fáa hjálp. Vit leggja okkum eftir at innheinta pening á heiðurligan hátt við so lágum kostnaði, sum til ber. Vit leggja stóran dent á gott samskifti við kundan.

Um hugskotið aftan fyri slagorðini "Ikki gera ikki nakað", sigur Jákup, at tá ið vit senda ein rykkjara, so má tann sum fær rykkjaran ikki setast hendur í favn – men heldur gera nakað. Tað er sjálvandi bíligast og best at gjalda skuldina alt fyri eitt, men vit kunnu altíð gera eina avtalu um longda gjaldsfreist. Gula kortið og "Fair Pay – please" er merki hjá Intrum um allan heim. "Fair Pay – please" vísir til, at hildnar avtalur í sambandi við gjalding er lykilin til gott handilssamband. Tá ið keypt og selt verður upp á borg, merkir tað, at partarnir gera sínámillum sáttmála. Verður rokningin ikki goldin, merkir tað, at "leikreglurnar" í sáttmálanum ikki eru hildnar.

Intrum Føroyar er ein deild hjá altjóða innheintingarfyritøkuni Intrum Justitia. Hetta er fremsta fyritøkan í Evropa innan miðvísa áognarstýring, sum á enskum verður rópt Credit Management Services. Á hvørjum ári viðger Intrum milliónir av málum fyri fyritøkur og stovnar kring allan heim.




*Jákup Bech Jensen, sjóri í Intrum Føroyar, við gula Peugeot-bilinum. Á síðuni standa slagorðini "Ikki gera ikki nakað"*

*Mynd: Jens Kristian Vang*